# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 03.11.2014*

**Bygdaráðsfundur 03.11.2014 kl. 16.00 til kl. 18.40**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 112/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0011-0046
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015.

Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til fyrstu viðgerð av fíggjarætlannini fyri 2015, hjá Nes kommunu, vera hesi

| **Rakstur** | **2015** | **2014** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 3.977 | 3.833 | 144 | 3,8 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 3.898 | 4.174 | -276 | -6,6 |
| §3 Børn og ung | 9.174 | 9.239 | -65 | -0,7 |
| §4 Undirvísing | 3.888 | 3.669 | 219 | 6,0 |
| §5 Mentan og frítíð | 2.755 | 2.776 | -21 | -0,8 |
| §6 Teknisk mál | 3.736 | 2.757 | 979 | 35,5 |
| §7 Kommunalt øki | 2.717 | 2.895 | -178 | 6,2 |
| **Rakstur í alt** | **30.145** | **29.343** | **802** | **2,7** |
| | | | | |
| **Íløgur** | | | | |
| §2 Almanna- og heilsumál | 222 | 0 | 222 | |
| §3 Børn og ung | 1.250 | 100 | 1.150 | |
| §4 Undirvísing | 100 | 0 | 100 | |
| §5 Mentan og frítíð | 500 | 0 | 500 | |
| §6 Teknisk mál | 1.935 | 568 | 1.367 | |
| §7 Kommunal virki | 950 | 874 | 76 | |
| **Íløgur í alt** | **4.957** | **1.542** | **3.415** | **221,5** |
| | | | | |
| **Rakstur og íløgur í alt** | **35.102** | **30.885** | **4.217** | **13,7** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §20 Inntøkur v.m. | -33.295 | -31.884 | 1.411 | 4,4 |
| **Úrslit** | **1.807** | **-999** | **2.806** | **-281** |
| **Afturgjald av skuld** | **0** | **1.840** | **-1.840** | **-100** |
| **Av tøkum peningi** | **1.807** | **841** | **966** | **115** |

Fíggjarnevndin mælir til at skattaprosentið er óbroytt 20,50 % og at barnafrádrátturin er óbroyttur, kr. 5.000.

Fíggjarnevndin mælir til at hallið fyri 2015 verður fíggjað við tøkum peningi, og at avdráttir fyri 2015 verða umfíggjaðir.

Kommunurnar yvirtaka eldraøkið at umsita pr. 1. januar 2015, men hava ikki fingið at vita hvussu nógvar inntøkur fylgja við útleggingini. Yvirtøkan er tískil ikki við í framlagda uppskoti.

**Tilmælir**
Á fundi 31.10.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015 soleiðis, sum hon er uppsett.

Á fundi 31.10.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið, til fyrstu viðgerð, av Fíggjarætlanini fyri 2015, verður ásett at vera 20,5 %.

Á fundi 31.10.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at barnafrádrátturin til fyrstu viðgerð av Fíggjarætlanini fyri 2015, verður ásett at vera 5.000,00 kr. pr. barn.

**Avgerð**
Tilmælini frá Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 113/2014 Ymiskt**
J.nr. 2014-0029-0003
**Málslýsing**
Í skrivi 30.09.2014 søkir 13x frá studentaskúlanum á Kambsdali um eitt hvørt arbeiði fyri kommununa, og harvið fáa ein peningarligan stuðul afturfyri.

**Tilmæli**
Á fundi 21.10.2014 mælir Tekinska nevnd til at boða 13x frá, at kommunan onki arbeiði hevur til tey í løtuni.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 03.11.2014*

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og vísa til tann kommunala stuðulspolitikkin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 114/2014 Byggimál**
J.nr. 2014-0042-0337
**Málslýsing**
Í skrivi 04.08.2014 søkir Karl Johannesen um at fáa til keyps eitt grundstykkið á Toftum. Hann er áhugaður í at fáa grundstykki á Gaddavegnum, fyrsta stykkið norðanfyri verandi útstykking.

**Tilmæli**
Á fundi 21.10.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta Karl Johannesen fyrsta grundstykkið norðanfyri verandi útstykking á Gaddavegnum, og at kommunan ognar sær lendið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 115/2014 Byggimál**
J.nr. 2014-0042-0341
**Málslýsing**
Í skrivi 22.08.2014 søkir Jóan Pauli Juul um at fáa til keyps eitt grundstykkið á Toftum. Hann er áhugaður í at fáa grundstykki á Gaddavegnum, næsta stykkið norðanfyri verandi útstykking. Sum nr. 2 ynskir Jóan Pauli grundstykki matr. nr. 699av.

**Tilmæli**
Á fundi 21.10.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta Jóan Paula Juul næsta grundstykkið norðanfyri verandi útstykking á Gaddavegnum, og at kommunan ognar sær lendið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 116/2014 Vegamál**
2014-0044-0076
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av kostnaðinum fyri klárgering og asfaltring fyri ein part av Rókavegnum.
Tekniska deild hevur biðið um tilboð, frá EM Asfalt, uppá asfaltering av Rókavegnum.
Samlað tilboð uttan mvg er áljóðandi kr. 107.730,00.

**Tilmælir**
Á fundi 21.10.2014 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá EM Asfalt og at arbeiðið verður gjørt í ár.

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 118/2014 Trivnaðarmál**
J.nr. 2014-0031-0155
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av eykajáttan til Barnaverndartænastuna.

Eysturoyar Barnaverndartænasta søkir um eina eykajáttan fyri fíggjarárið 2014 uppá kr. 311.995,00. Herav er parturin hjá Nes kommunu kr. 64.474,00.

**Tilmælir**
Á fundi 23.10.2014 mælir Trivnaðarnevndin til, at Nes kommuna rindar sín part av eykajáttanini.

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at játtanin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.